# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

Oyggjablaðið í næstu viku:
**Handilsøkið á Hálsi í Havn**

## Hesaferð: Svínoy

**Hetta Oyggjablaðið hevur Svínoynna í fokus. Lesið hetta í blaðnum:**

**Síða 18:**
Stubbar úr oynni

**Síða 20-21:**
24 ára gamla Sólvá trívist í Svínoy

**Síða 22:**
Hvagani kom seiðurin?

**Síða 23-25:**
Eyðun hevur góðar vónir um heimbygdina

**Síða 26-27:**
Lítil handil má eisini geva yvirskot

**Síða 28-29:**
Ferjuhavn og tunnil hoyra saman

**Síða 30-31:**
Gott at koma aftur til Svínoyar

**Síða 32:**
Regin tekur ímóti ferðafólkunum

## 39 EFTIR

Tað vóru tær tíðir, tá fólkatalið í Svínoy táttaði í tey 250. Síðani tá er talið lækkað ár undan ári, til tað í dag er á tí lægsta nakrantíð - 39.

Hagtølini prógva eisini gongdina tey seinnu árini. Nógv fólk var í oynni, meðan smoltstøðin var opin, men tá hon lat aftur í 2003 minkaði talið skjótt.

Í dag eru tey 39 í tali, men vónir eru kortini um, at talið kann fara at økjast aftur, nú gongd so smátt er við at koma á smoltstøðina aftur.

Her verður arbeitt í vaktum, og tí er ikki óhugsandi at okkurt av starvsfólkunum kann fara at flyta út higar, nú sannlíkindi eru fyri støðugum arbeiði.

snorri@sosialurin.fo



**FÓLKATAL**

*2003 var árið, tá flest fólk búðu í Svínoy. Tá vóru tey 73 í tali, men í dag er talið 39. Fólk hava kortini ikki mist vónina um at bygdini kann verða lív lagað í framtíðini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## VATNLEIÐING



**HANDAMEGI**

*Hóast teir báðir ikki hava maskinur til hjálp, hevur arbeiðið við at leggja nýggja vatnleiðing til øll húsini í Svínoy gingið javnt og samt framá*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Svínoy er partur av Klaksvíkar kommunu og hevur notið gott av hesum samstarvinum, millum annað nú ið nýggj vatnleiðing skal leggjast til øll húsini í bygdini.**

**Í farnu viku vóru tveir mans í ferð við at leggja hesa vatnleiðingina til tvey av ovastu húsunum í bygdini.**

snorri@sosialurin.fo